# Eitt valdømi – fyri seinastu ferð

**JÓGVAN SUNDSTEIN**
Fyrrv. løgmaður



Oddagrein í Sosialinum 19.10.2007 hevur yvirskrivtina : Eitt valdømi best fyri framtíðar Føroyar. Grundgevingarnar fyri hesum verða síðani útgreinaðar í blaðgreinini. Aftaná at hava lisið greinina má eg siga, at innihaldið heldur prógvar, at eingin fyrimunur er við einum valdømi. Tvørtur ímóti verður ein slík broyting í valskipanini – um ikki ein vanlukku – so eitt stórt afturstig fyri politisku skipanina í Føroyum.

Fyrst verður løgtingsformaðurin endurgivin fyri at siga, at málið hevur fingið drúgva viðgerð bæði í fólkinum, millum serfrøðingar og millum politikarar. Hetta fari eg at ivast í. Tað velst sjálvandi um, hvat ein drúgv viðgerð er. Í fólkinum haldi viðgerðin hevur verið meira so sum so. Onkur spurnarkapping hevur verið, men annars hevur málið ikki verið aktuelt í meira enn nakrar fáar mánaðar og stórt sæð bert borið fram av tingformanninum og lagt fram sum tingmál 4-5 mánaðar fyri eitt løgtingsval. Viðgerðin millum serfrøðingar hevur kanska vart eitt sindur longur, men út frá øðrum sjónarmiðum um nýggjar útrokningarhættir v..m. Sjálvt uppskotið um eitt valdømi hava serfrøðingar bert viðgjørt hesar seinastu fáu mánaðarnar. Og tað eg havi sæð hava teir flestu ávarað ímóti at seta lógaruppskotið hjá tingformanninum í gildi. Í øllum førum er tað óðamannaverk at gera tað til eitt brátt komandi val. Politikarar hava viðgjørt málið seinastu tíðina, men týðuligt er at merkja, at tað ikki bert eru sakligar grundgevingar fyri støðutakan teirra.

Sosialurin metir, at tíðin er komin at taka avgerðina um broyting frá einum landsdekkandi løgtingið til eitt kommunalt valt ráð, nú beinanvegin. Blaðstjórin vónar (eg haldi hann væntar), at fáa at síggja:

Eitt meira professionelt lið av tingfólki, og at sett verða heilt nýggj krøv til politikarnar

Sum skal síggja landið sum eina heild, har teir valdu eru landspolitkkarar, sum virka fyri alt landið og ikki bert fyri sína heimbygd ella bý

Og ikki sum smærri øki, ið stríðast ímóti hvørjum øðrum

At sleppast skal undan teim eyðkendu dupultfunktiónunum, har politikarar sleppa at oyðsla við ressursunum

Skipanin skal samansjóða hetta oyggjalandið

Viðv. 1.Eg fari at spyrja: Hvørji nýggj krøv verða sett til politikarar valdir í einum felags valdømi framum teir sum nú verða valdir í ymiskum valdømum?? Her krevst ein gjøllig frágreiðing, sum ikki kann gerast áðrenn týsdagin 23. oktober 2007. Og hvussuleiðis verða teir meira "professionellir", um teir verða valdir á einum landslista heldur enn á einum minni valdømislista. Í løtuni verða nakrir tingmenn valdir sum útjavningarmandatir, tað vil siga við atkvøðum um alt landið. Eru teir meira professionellir enn teir valdømisvaldu? Eg haldi ikki nakar kann síggja munin. Um blaðstjórin við "professsionellar" hugsar um politikarar við serstakari útbúgving, so er heilt galið. Teir fólkavaldu skulu koma frá fólkinum, og øll skulu hava møguleika fyri at verða vald uttan krøv um serstaka útbúgving.

Viðv. 2. Er tað veruliga so, at Føroya størsta blað heldur, at teir politikarar, sum higartil hava sitið á Føroya Løgtingi ikki síggja landið sum eina heild?? Tað er júst tí, at hesir verða valdir úr ymsum plássum, at vit fáa eina heildarumboðan í Løgtinginum. Harvið verður landið røktað, men eisini verður hædd tikin fyri teim ymsu økjunum í landinum.

Viðv. 3. Tey smærri økini stríðast ikki ímóti hvørjum øðrum. Tvørtur ímóti arbeiða tey fyri ein stóran part saman. Harafturímóti er vandi fyri, at tey stóru økini gloyma tey smærru, og tað verður uppaftur verri við einum valdømi.

Viðv. 4. Hetta við dupultfunktiónum og oyðslan av resurssum skilji eg ikki. Her krevst ein meiri nágreinilig frágreiðing.

Viðv. 5. Tað er ikki eitt valdømi og harav standandi miðsavnan, sum samansjóðar landið Tað er tvørtur ímóti umboðan og røddir frá ymsu pørtunum av landinum, sum gera hetta møguligt. Eitt feskt dømi um hetta er Sandoyartunnillin. Ein slíkur vil samansjóða Sandoynna við ein stóran part av landinum. Men hvar finst mótstøðan móti hesu? Júst í tí miðsavnaða partinum.

Lógaruppskotið um Føroyar sum eitt valdømi er eitt misfostur. Vallógin eigur at verða broytt, men út frá heilt øðrum sjónarmiðum. Teim ymisku økjunum eigur at vera tryggjað umboðan á tingi, samstundis sum broyting av talinum av útjavningarmandatunum skal tryggja flokkunum javnbjóðis umboðan. Tá vera møguleikar fyri, at landið alt verður útbygt. Samanumtikið kann sigast um lógaruppskotið:

at tað brýtur við vanligar demokratiskar reglur um, at øll øki í landinum fáa umboðan. Hetta er ein fortreyt fyri at demokratiið kann virka.

at áhugin fyri politikki í lokaløkjunum fer at minka, tá hesi onga ávirkan koma at fáa á uppstillingarnar hjá teim ymisku flokkunum.

at vandi er fyri, at umboðanin í tinginum verður nógv meira flokkscentrerað enn geografiskt umboðað og harvið ofta meiri "fakidiotisk".

at við lógaruppskotinum verður nógv størri møguleiki fyri leysgangaralistum. Eingi krøv eru til undirskrivtir fyri at stilla upp í tí eina landsumfatandi valdøminum. Harvið verður eisini møguleiki fyri, at politisku flokkaskipanirnar syndrast.

at listar við meira enn 40 nøvnum á hvørjum fer at ørkymla veljarnar við tilvildarligum valum sum úrslit

at menn als ikki hava gjørt sær greitt og sett seg inn í hvørjar aðrar fylgir standast av uppskotinum, sjálvt um tingformaðurin sigur at tað er gjølliga viðgjørt.

Minsta kravið til tingmenn, sum nú skulu taka endaliga støðu til málið, er at teir útseta tað til eina nýggja støðutakan aftaná eitt løgtingsval. Annars er málið av so stórum týdningi, at løgmaður átti at nýtt sín rætt at útskriva val beinanvegin og harvið fáa viðgerðina av málinum inn í valstríðið. Tað er júst til slík føri, at rættur hansara at útskriva val er ætlaður.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri faðir, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Bogi Winther**
á Landavegnum í Havn

andaðist á Landssjúkrahúsinum 22. oktober, 86 ára gamal.
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni hósdagin 25. oktober kl. 15.00.

*Familjunar vegna*
**Sigrid og Dorthea**

*Tey ið vilja minnast Boga, Sigrid og Dorthea kunnu senda eina gávur til Sands kirkju, konto í peningastovnunum.*

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Herdis Müller**
búsitandi í Havn

andaðist mánadagin 22. oktober, 83 ára gomul.
Jarðarferðin verður úr Ebenezer fríggjadagin 26. oktober kl.14.00.

**Familjan**

*Tey, ið vilja minnast Herdis, kunnu lata Zarepta eina gávu, konta í peningastovnunum*

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á einhvønn hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá ið elskaða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Ada á Reynatúgvu**
á Sandi

doyði og varð jarðað.
Hjartans tøkk øll tit, sum vóru góð við hana, meðan hon var okkara millum.

*Familjunnar vegna*
**Anna, Hanna, og Páll**
**Katrin, Niels, og Heini**

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við

**Dagurin**
**Dagurin 25. oktober. Crispinus**, deyður umleið ár 300. Hann og bróðurin Chrispianus flýddu úr Róm undan Diocletiani keisara, og búsettust sum skósmiðir í Soissons í Fraklandi